DAGSINS MEINING

Partabrøv til fólkið

Uppskotið hjá Javnaðarflokkinum um at lata øllum Føroyingum partabrøv í Føroya Banka hevur sum heild fingið góða móttøku. Onkur hevur tó talað at.

Umboð fyri kappingarneytan hjá Føroya Banka tosaði um kappingaravlaging. Tað er væl skilligt, at hann er eitt sindur misnøgdur, men til tað er bert at siga, at kappingaravlagingin hendi, tá bankin varð bjargaður, og at tað er farið afturum nú. Borgarin eigur bankan sum er, so tað burdi ikki broytt so nógv upp á loyalitetin.

Formaðurin í Búskaparráðnum segði, at tað gjørdi hvørki til ella frá, um partabrøv vóru latin borgarnnum, men at partrabrøvini við tíðini fóru at samlast á færri hondum. Tað er eingin, sum hevur pástaðið, at partaeigarabýtið fór at vera tað sama í allar ævir, og er tað ein sjálvfylgja, at tað broytist. Tað sum hevur týdning má vera, at borgarin sjálvur ger av, hvat hann ætlar við partabrøvunum. Óivað vilja tey flestu varðveita sítt partabræv sum eina uppsparing.

Karsten Hansen vísir enn einaferð sítt snildi í at gera samanberingar. Hann kallar tað ein blokk til allar føroyingar. Nú er ilt at siga, hvat maðurin hugsar fyri sær, men so vítt vit vita, so er hetta ein ognaryvirføring, ið skal fara fram yvir eitt styttri tíðarskeið, og tí als ikki kann samanberast við nakran blokk.

Løgið, at uppskotið hevur fingið so kalda móttøku frá tí fyrr so verkamannavinarliga Tjóðveldisflokkinum. Er tað fullveldisgrunnurin, ið gerst ov slunkin? Argumentið um yvirforbrúk heldur ikki, um man hyggur at søguni. Tá vit nú vita, at søguligt baksýni ikki er sterkasta síðan hjá nýggja ættarliðnum í Tjóðveldisflokkinum, so er tað upp á sítt pláss, at vit minna á, at føroyingar vanliga sita á partabrøvum og handla í ógvuliga moderatum málistokki.

Onkur vil siga, at hetta fer at broytast, tá partabrævamarknaðurin kemur. Her má man heldur siga, um hann kemur. Tað er sera ivasamt, um hann nakrantíð kemur, tá man nú sær, hvussu stórir partabrævamarknaðir úti í heimi stríðast við manipulering, insidara problematikki o.s.fr.

Vónandi fer uppskotið at vera framt í verki, uttan at man fer at blanda gomul partabrøv uppí. Skulu gamlir aktionerar yvirhøvur koma uppá tal, so má man finna allar smáaktionerarnir fram aftur, har partabrøvini vóru niðurskrivaði á null, og tað ber illa til. Tí kunnu gomlu stóraktionerarnir gloyma alt um uppskriving, uttan at allir teir gomlu sleppa upp í part. Ikki hevði tað verið rættvíst, um onkur palliba, ið átti túsund krónur í Sjóvinnubankanum og Føroya Banka sat við sviðið soð, tí hansara brøv fyri nøkrum árum síðani fóru á null, meðan gomlu stóreigarnir, ið eisini stýrdu bankunum, nú aftur fingu í posa og sekk. Skattgjaldarin eigur bankan, og tí fær uppskotið frá Jóannis Eidesgaard vónandi breiða undirtøku í verandi líki.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Sjónvarpið og føroyskar sendingar

Jógvan Arge,
løgtingsmaður fyri tjóðveldisflokkin

Tað hevur verið ein afturvendandi spurningur øll árini, vit hava havt sjónvarp, at ov litið hevur verið at gera sendingar fyri.

Eg helt altíð, at SvF byrjaði frá tí skeiva endanum, tá tað fyrst og fremst legði seg eftir tíðindum, og lat sendingar koma í aðru rað.

Serliga tí, at tíðindini gera ikki so nógv út á sendiflatuni sum heilar sendingar og eru heldur ikki eitt so fjølbroytt tilboð, sum sendingar kunnu vera.

Tessvegna hevur heldur ongantíð eydnast at geva SvF ein føroyskan profil á sama hátt, sum tað eydnaðist at geva útvarpinum ein føroyskan profil.

Nú standa vit mitt í tí. Tróndur fer at endurvarpa alt tað, sum hann endurvarpaði í Vørsluni og nakað væl aftrat. Heilar 20 rásir, siga tey.

Uppi í hesum er alt tað, sum SvF hevur dúvað uppá – uttan tey føroysku tíðindini og tær fáu føroysku sendingar, sum sjónvarpinum hevur eydnast at byggja upp eftir næstan 20 árum.

Tað er ikki uttan ivamál at tosa um, at løgtingið skal játta SvF pengar á figgjarlógini til at gera egnar sendingar fyri. Ein sera viðkomandi spurningur er, um tað er heppið, at løgtingið skal gera av, hvussu nógvar pengar sjónvarpið fær at gera tíðindi og sendingar fyri?

Vit hava øll somul verið vitni til goragangin frá politikarum móti sjónvarpinum í seinastuni, og tað hevur ikki verið sørt, at spurningurin um at skerja møguleikarnar hjá SvF orsakað av tess tíðindaflutningi hevur verið nevndur.

Tað er langt úti, men hóttanirnar eru ein veruleiki, og eftir mínum tykki verða tendensirnir ikki mjúkari, um politikarar sleppa at sita beint á kassanum, sum skal figgja eitt nú tíðindasendingarnar.

Eg ivist ikki í, at vit skula hava føroyskt sjónvarp, og at vit skula veita tí møguleikar at gera nógvar sendingar.

Eg skjóti tí upp, at hetta verður gjørt á tann hátt, at viðgerðin av tíðindum og aktuellum tilfari í SvF framvegis verður figgjað av hyggjaragjaldinum.

Sum eitt neyðugt mentanarpolitiskt átak verður játtað ávís upphædd til at gera sjónvarpssendingar fyri, men hendan játtan verður hildin leys av tíðinda- og aktualitetsdeildini hjá sjónvarpinum.

Játtanin fer til ein stovn ella deild, sum suverent hevur við framleiðslu av øllum øðrum sendingum sjónvarpsins at gera.

Tá vissa vit okkum, at pengarnir verða brúktir til sendingar, og at politikarar ikki brúka játtanina til at ávirka tann óhefta tíðindaflutningin, sum er so neyðugur.

Spurningurin um fjølmiðlaábyrgdarlógina eigur sjálvsagt at verða loystur samstundis, so bæði almenningurin og løgmaður vita, hvar tey eiga at venda sær, tá tey halda seg vera illa viðfarin.

Hvat er ein føroyingur?

Karl Johan Mikkelsen
journalistur búsitandi í Danmark

Sambært Ritzau Bureau í dag, fríggjadagin 9. august, er sett fram tað áhugaverda og gávumilda uppskot, at allir føroyingar fáa 5.000 krónur tillutaðar sum partapening í Føroya Banka í sambandi við ætlaðu privatiseringina.

Hetta reisur tó ein áhugaverdan spurning: Hvat er ein føroyingur, og hvørjar treyir skulu lúkast til tess at fáa ein slíkan gávukekk.

Er tað ein persónur, sum er føddur í Føroyum?

Er tað ein persónur, hvørs bæði foreldur eru føroyngar?

Er tað ein persónur, har annað foreldur er føroyingur?

Ella er tað ein persónur við donskum ríkisborgararætti, ið er tilmeldaður fólkayvirlitinum í Føroyum ein ávísan dag?

Er talan um hetta síðsta, so kann føroyska ferðavinnan vænta stóran vøkstur. Danir, grønlendarar – og føroyingar búsitandi uttanlands fáa væl eisini lut í gávufestinum.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktionin:
tel. 220507
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

TINGHELLAN

Tey sum eiga fáa meira

Summarfrí hevur valdað á tinghelluni eina tíð, men í heyst fer helst at vera meiri lív í. Á tinghellni í dag ger Kári á Rógvi viðmerkingar til uppskotið um at lata føroyingum partabrøv í Føroya Banka

Kári á Rógvi

Føroyingar eru vanir við sterkan felagskap. Á báti, á fjalli, í ítrótti virka føroyingar saman. Føroyingar eru eisini vanir at eiga vinnuognir saman. At eiga part í báti ella neysti, ella at eiga í einum haga er partur av uppvøkstrinum hjá nógvum føroyingum.

Partur av kreppuni í 80'unum var tann vantandi ábyrgdin. Gomlu ognarviðurskiftini vóru soleiðis, at hvør kendi ábyrgd av ognum sínum og kendi sviðan, um ikki raksturin bar seg. Men hetta broyttist, og so líðandi gjørdu ov vánaligar lógir og ov gott lag á bankamonnum, at einhvør kundi skjóta nøkur oyru í eitt partafelag og síðani lána uttan ábyrgd. Føroyski spararin helt, at pengarnir stóðu tryggir á bók, men teir vóru tó ikki tryggari enn útlánspolitikkurin hjá pengastovnunum.

Føroyski skattgjaldarin hevur við sveitta sínum keypt tveir bankar og mong fiskavirki orsaka av 80'arakreppuni. Samstundis eigur skattgjaldarin eina reð av ognum, sum so ella so gjørdust almennar í farnum tíðum. Alt frá telefonkaðalum og háspenningslinjum til flakalinjur og jørð eru ogn hjá Palleba og Marsannu.

Avbjóðingin er at umskipa hesi ognarviðurskiftini. Partvís er tað ein tryggari skipan at byggja á eginpening og nógvar persónligar eigarar enn á kollektivan ognarrætt og byrokratisk millumlið. Partvís er tað óneyðugt hjá skattgjaldaranum at hava so nógvan pening bundnan í felags ogn, sum ikki verður brúkt til felags gagn.

Hagin

Føroyingar duga ofta illa at leita til sín egna mentanararv eftir íblástri. Hetta er stórt spell, tí har er mangan nógv gott at finna.

Lat okkum hyggja at haganum. Ein hagi er eitt partafelag, sum føroyingar sjálvir hava uppfunnið fyri nærum túsund árum síðani, ongin veit rættiliga nær. Tað løgna er, at ongin nakrantíð hevur tikið hagan upp á tungu í samband við vinnulóg í Føroyum.

Í eitum haga kunnu vera t.d. 80 gyllin (5 merkur) í partapeningi. Rættindi og skyldur verða býtt eftir ognini. Tann, ið eigur 8 gyllin, fær dupult so nógv – og skal gera dupult so nógva nyttu – sum tann, ið eigur 4 gyllin.

Dagliga leiðslan – seyðamaðurin – má vísa á nøktandi úrslit og má duga at greiða eigarunum frá rakstrinum annars verður hann ikki afturvaldur. Eigararnir mugu kenna ábyrgd og mugu samstarva, skal nakað spyrjast burturúr.

Gamalt var

Privatisering er ikki nýggj í Føroyum. Í fleiri hundrað ár hava vit havt skipanir við traðum. Tann skipanin er at lata fólk fáa ein jarðarteig at velta, sum tey síðani fáa til ongar, tá tey hava skapt nøkur virði burturúr náttúruni og strevi sínum.

Traðir eru ikki bert kendar, tá kongsjørðin er latin ognarleysum. Men eisini í fleiri bygdum við ognarjørð er tað komið fyri at latið øllum húskjum í bygdini hvør sína trøð. Harumframt hava hagarnir latið einstøku eigararnar lagt jørð inn av haganum.

Mest týðandi privatiseringin hevur tó verið, at føroyingar hava fingið grundstykki til ognar og hava kunna bygt sær sethús. Júst sethúsini eru í mongum londum mest týðandi ognin hjá einum húski.

Granskarar í trupulleikum hjá menningarlondum, eitt nú Hernando de Soto úr Peru, hava vístá, at skipaði ognarviðurskifti og privatur ognarrættur hjá tí lítla manninum til hús og jarðarteigar eru millum avgerandi fortreytirnar fyri búskaparligari menning.

Tað var ikki av tilvild, at trappubrøðurnir keyptu fyrstu sluppina. Teir áttu eina trøð at seta í veð. Vit eru skjót at viðurkenna stríðið hjá fiskimanninum. Men menningin frá trælabúskapi til KT-samfelag bygdi líka nógv á, at fiskimaðurin kundi ogna sær hús og jørð og seta tey í veð at keypa skip fyri. Skipaði ognarviðurskifti gera tað gjørligt at spara saman og fáa kapital burturúr arbeiði og ognum.

Við javna í huga

Javnaðarflokkurin er nú komin fram við tankanum um at lata vanliga føroyingum partabrøv í Føroya Banka. Hetta er ein sera spennandi tanki, ikki minst tí tað noyðir okkum at hugsa um býtið millum almenn og privat, sjálvdrátt og felagskap.

Javnaðarflokkarnir hava ofta verið fyri felags ognarrætti. Í Bretlandi var øgilig ídnaðarframleiðsla løgd undir skattgjaldaran, sum at enda átti bæði bilverksmiðjur og oljufeløg og íbúðir. Síðani tá er bretski javnaðarflokkurin farin frá hugsanini um kollektivan ognarrætt til alla búskaparframleiðslu.

Hóast teir ikki siga tað so hart, so taka teir undir við, at Margareth Thatcher seldi bretskt stál, gass, tele og annað mangt, umframt at geva vanliga bretanum rætt at keypa ta kommunalu leiguibúðina.

Úrslitið er, at vinnulívið verið rikið betur, fólk trívast betur og skapa fleiri virðir enn áður - og tessvegna kemur meiri skattur í almennu kassarnar, umframt at almenna skuldin er goldin.

Tað er eitt sindur av 'if you can't beat, them join them' yvir hugsanini hjá bæði Blair og Eidesgaard. Privatur ognarrættur, partaeigarademokrati og avrikskløn eru úlvar í gomlum javnaðarsagnum, men við at ýla saman við hesum úlvum verða betur ráð at fremja kjarnumálini hjá javnaðinum.

Vøkstur og uppaling

Sjálvsagt kundi landið selt bankan og goldið almennu skuldina, ella latið skattalætta. Summir óttast tó ov bráðligan búskaparvøkstur, aðrir at bankin gerst ov sterkur. Hesar orsøkir kunnu viga ímóti; men taka tingmenn undir við at býta partabrøvini út, fær tað fleiri heppin árin.

Fyri Jørn Astrup Hansen merkir tað, at hann eins og seyðamenninir nú skal greiða tí meiniga mannínum frá, hvat hann ger. Men tað eru neyvan nógvir frægari pedagogar millum vinnustjórar enn júst Astrup. Tað kann so vísa vegin til meiri lesiligar ársroknskapir og størri hug at spara upp í partabrøvum. Tað verður eisini vónandi so, at ein slíkur hópur av partaeigarum fer at krevja betri vinnulógir og betri rakstur enn tað vit kendu undan kreppuni.

Fara Palleba og Marsanna at seta aðrar sparipengar í partabrøv, verður føroyska búskapargrundin steinsett og betri lagað upp at standa ímóti komandi búskaparódnum.

Fígging við eiginpeningi ger, at virkið ikki doyr rentudeyðan í ringum tíðum. Nógvir partaeigarar gera eisini, at fleiri eygu fylgja við, hvat hendir.

Fleiri verkætlanir fáa vælvild og menn taka størri vága, tá fleiri kenna sær ábyrgd. Lítil ivi man vera um, at eitt fyribrygdi sum Norrøna var ikki til, um ikki so nógvir føroyingar áttu partabrøv í Smyril Line – og fleiri høvdu sett so mikið nógv í felagið.

At býta nøkur partabrøv millum teir skattgjaldararnar, sum hóast alt eiga tey, fer at læra føroyingar, hvat tað er at eiga partabrøv og geva teimum størri áhuga fyri vinnulívinum. Samtundis noyðist vinnulívið at geva sær størri far um føroyingin. Ti demokratiið er veikt í vinnulívinum. Vanliga sita konan og kettan hjá stjóranum í nevndini, og aðalfundurin verður hildin afturvið kaffi onkran sunnudag.

Ikki minst er tað spennandi, at júst Føroya Banki skal gerast so fólksligur, tá Sparikassin er farin øvugta vegin og hevur latið einum andlitsleysum grunni nærum øll partabrøv síni. Er tað óheppið fyri kappingina, at øll fáa júst partabrøv í Føroya Banka, ber til at taka FøroyaTele, Fiskavirking – enntá kommunala SEV – eins og onnur við um somu leið, so fólk kunnu velja sær partabrøvini sjálvi.

Síðani

At býta partabrøvini millum øll er líka føroyskt sum grindabýti, traðarmentan og sethús. Tað er eisini so vælsignað frítt fyri ismuideologi. Sjálvsagt kunnu vera orsøkir til ikki at gera tað í ávísum førum ella til ávísar tíðir, men hugskotið er slóðbrótandi.

Partabrøvini verða ikki forbrúkt á sama hátt sum um fólk fingu pengar á bók, og gerast partabrøv hvørsmans ogn kunnu vit vænta bæði øðrvísi fígging, uppsparing og vinnuligt stýrislag.

Heldur enn sum nú altíð at hava almenn byrokrati – grunnar, ráð og stýri – ella privat byrokrati – bankar, ílogufeløg, tryggingar – sum millumlið millum spararan og vinnuna, fer spararin tá at kunnu fáa størri beinleiðis ávirkan eins og ávirkan í felag við øðrum. Fyri teir privatu stovnarnar er tað tó helst bert kærkomið at fáa eitt sindur av kapping um sparipengarnar, og tað fer eisini at vera brúk fyri teimum at umsíta mong partabrøv.

Serliga er tað áhugavert at fáa eitt orðaskifti í lag um stýrisskipanina hjá partafeløgum og um fólksliga ávirkan á og innlit í vinnulívið.